HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Til partarnar á ummælisyvirlitinum

25. juli 2024
Mál: 24/04557-80
Viðgjørt: Katrin Gaard

**Ummæli: Uppskot til løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum**

Heilsumálaráðið sendir hervið uppskot til løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum til ummælis.

**Yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er at fáa eina skipan, sum:**

- tryggjar øllum fólkum kring landið atgongd til støðugt fleiri tilboð um dygdargóðar heilsutænastur í nærumhvørvinum, og tryggjar sama høga dygdarstøði í øllum landinum,
- setur sjúklingatrygdina í hásæti,
- skapar betri møguleikar fyri, at heilsustarvsfólk kunnu starvast og mennast í heilsufakligum umhvørvum kring landið.

Fortreytin fyri at kunna røkka hesum máli er, at verandi kommunulæknaskipan verður víðkað og ment til eina skipan við heilsutænastum og heilsumiðstøðum í heilsuøkjum kring landið.

Í heilsuøkjunum fara at verða veittar kanningar, viðgerðir, heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tilboð og ráðgeving. Ymsir heilsustarvsfólkabólkar fara at starvast á heilsumiðstøðunum. Tilboðini um heilsutænastur skulu vera á sama høga dygdarstøði kring alt landið. Sum frálíður fara tær viðgerðir, sum kunnu flytast, at verða fluttar frá Sjúkrahúsverkinum til nærumhvørvið hjá fólki.

Fyri fólk fer hetta at merkja, at viðgerðir í størri mun fara at kunna fara fram í nærumhvørvinum hjá viðkomandi, og harvið verða tilboð um heilsutænastur lættari atkomulig. Serliga fer hetta at vera til fyrimuns fyri eldri fólk, fólk við varandi sjúkum og fólk við serligum tørvi.

Kommunurnar varðveita skylduna at útvega hølir og innbúgv. Sum nakað nýtt fær landið ein leiklut í sambandi við hølini, m.a. hvar tey verða staðsett og innrættað. Landið yvirtekur skylduna hjá kommununum at útvega tól og amboð. Hesi viðurskifti fara at gera tað lættari at flyta heilsutænastur til heilsumiðstøðirnar.

Nýggja lógin hevur við sær, at møguleikar fyri menning sum heild verða betri, og dentur fer at verða lagdur á, at skipanin støðugt verður dygdarment. Hetta verður gjørt við, at landsstýrisfólkið fær heimild til at seta krøv til fakligar førleikar hjá starvsfólkum, seta krøv um viðlíkahald og eftirlit við tólum, amboðum og KT.

Sum nakað nýtt verður heimild til at fara undir størri royndarskipanir at troyta nýggjar leiðir, undir hesum m.a. nýggj viðgerðartilboð.

Broytingin og menningin frá kommunulæknaviðtalum til heilsutænastur kring landið, er bæði ein fortreyt fyri at kunna gagnnýta starvsfólkaorkuna og fíggjarligu orkuna í heilsuverkinum skilabetri, enn møguleiki er fyri undir verandi skipan; og ein fortreyt fyri at kunna tálma útreiðsluvøkstrinum í Sjúkrahúsverkinum. Við at skipa økið á henda hátt, ber til at hava eina skipan, sum er burðardygg í framtíðini.

Sambært lógaruppskotinum fær landsstýrisfólkið neyðug stýringsamboð til at skipa, stýra og menna økið á skilabesta hátt og við bestu tilfeingisnýtslu í hyggju.

Heilsumálaráðið fer hervið at kunna um, at hoyringssvarini til lógaruppskotið verða almannakunngjørd á heimasíðuni hjá Løgtinginum, tá lógaruppskotið er lagt fyri Løgtingið.

Møguligir spurningar til lógaruppskotið kunnu sendast til Katrin Gaard (katrin.gaard@hmr.fo) og Biritu Ludvíksdóttir (birita.ludviksdottir@hmr.fo).

Freistin at lata Heilsumálaráðnum møguligar viðmerkingar til lógaruppskotið er í seinasta lagi 10. september 2024, kl. 16:00. Viðmerkingarnar skulu sendast til Heilsumálaráðið (hmr@hmr.fo) við avriti til Katrin Gaard (katrin.gaard@hmr.fo).

Vinaliga

Katrin Gaard
fulltrúi